## Hans brotið hondina

Um vikuskiftið var 18 ára gamli Hans Jørgensen millum stólparnar, tá FC Amager hevði vitjan av Herfølge í næstbestu donsku fótbóltsdeildini. Og hóast FCA tapti 2-1, vóru skoðsmálini til málverjan góð. Men nú noyðist hann at binda frið eina tíð, tí í gjár var hann so óheppin at bróta hondina undir venjing, so næstu tríggjar vikurnar skal hann at ganga við hondini í gipsi.



## Jón Nielsen til HB

Skjótt 29 ára gamli Jón Nielsen er best kendur frá flogbóltinum, har hann í fleiri ár hevur verið ein av fremstu spælarunum í landinum. Á fótbóltsvøllinum hevur hann ikki gjørt eins nógv um seg, men hann hevur verið millum berandi kreftirnar hjá bæði SÍ, FS Vágum/07 Vestur og AB. Nú skal Jón Nielsen tó fyri fyrstu ferð royna seg hjá einum av teimum stóru, tí komandi kappingarárið skal hann styrkja um verjupartin á besta HB-liðnum.

# Alt hendir í Hoyvíkshøllini

**Hóast tríggir dystir eru á skránni í Atlantic Airways-deildini sunnudagin, er tað bara dysturin millum H71 og Neistan, sum hevur nakran týdning – sera stóran enntá**

HONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Enn er einki avgjørt í kappingini um, um tað verður H71 ella Neistin, sum sleppur at spæla FM-finalur ímóti VÍF. Sum er, hevur H71 spælt ein dyst meira enn Neistin, sum jú skal spæla ein heimadyst ímóti VÍF umaftur, og í løtuni er H71 tvey stig framman fyri Neistan.

Sjálvt um hoyvíkingar skuldu vunnið sunnudagin, er enn ikki alt leyst og liðugt, tí innanhýsis hevur Neistin eingreiðan fyrimun, skuldi staðið á jøvnum. Neistin hevur vunnið allar tríggjar undanfarnu dystirnar ímóti H71, sum tí bæði skal vinna og vóna, at VÍF kann taka stig frá Neistanum í dystinum frá 18. januar, sum nú verður spældur umaftur mikukvøldið.

Júst teir tríggir undanfarnu dystirnir millum H71 og Neistan hava verið sera javnir, og Neistin hevur tvær ferðir vunnið við einum máli og eina ferð við tveimum. Tí skal vera løgið, um ikki talan enn eina ferð verður um ein javnan dyst, har bæði lið fara at leggja nógv fyri, tí sigur er snøgt sagt eitt krav.

Vinnur Neistin enn eina ferð, hevur Neistin tveir dystir at styrkja sær um støðuna við, meðan H71 bert hevur tann eina, so tí liggur mesta trýsti á heimaliðnum.

### Einki at siga

Tveir aðrir dystir eru eisini á skránni sunnudagin, men týdningurin av teimum er fyri einki at rokna, um samanborið verður við dystin í Hoyvík, sum næstan kann kallast ein hálvfinala.

Kollfirðingar fáa vitjan av oddaliðnum úr Vestmanna, og hóast VÍF má roknast sum stórfavorittur ímóti KÍF, so er mest hugsandi, at gestirnir annaðhvørt lata ungar mans sleppa at framat at spæla ella fara at royna ymiskt, ið kann koma til góðar í finalunum.

Og í hinum dystinum, sum er í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn, tekur Kyndil ímóti StÍF. Her er einki annað enn æran at spæla fyri, tí hvørki liðið kann flyta seg tað allarminsta á stigatalvuni, har StÍF er og verður nummar fýra og Kyndil nummar fimm.

Allir tríggir mansdystirnir sunnudagin byrja klokkan 16.



*Neistin hevur havt takið á H71 teir tríggjar undanfarnu dystirnar, men sunnudagin má og skal H71 vinna, tí Neistin hevur eftir tann dystin framvegis tveir eftir*
*Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir*

**Hondbóltur**

**Atlantic Airways-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF *) | 17 | 14 | - | 0 | - | 3 | 487 | 439 | 48 | 28 |
| 2 H71 | 18 | 12 | - | 0 | - | 6 | 487 | 411 | 76 | 24 |
| 3 Neistin *) | 17 | 11 | - | 0 | - | 6 | 499 | 460 | 39 | 22 |
| 4 StÍF | 18 | 7 | - | 2 | - | 9 | 433 | 456 | -23 | 16 |
| 5 Kyndil | 18 | 4 | - | 2 | - | 12 | 423 | 482 | -59 | 10 |
| 6 KÍF | 18 | 3 | - | 0 | - | 15 | 423 | 504 | -81 | 6 |

*) Dysturin Neistan-VÍF frá 18.januar verður spældur umaftur 1. apríl

## Útisetakvinnur flyta upp

**Kvinnurnar hjá ÍF Føroyum hava tryggjað sær uppflyting, meðan harrarnir standa yvir fyri einum finaludysti í næstum**

HONDBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Síðsta sunnudag spældu kvinnurnar ímóti CBS og vunnu 22-18. Harvið er uppflytingin veruleiki, so komandi kappingarár spæla tær í Seriu 1, sum svarar til 4. deild í Danmark. Oman fyri hesa deild eru Københavnarserian, 1. deild og Guldbagerligan.

Enn er ein dystur eftir at spæla í deildini, men tá ÍF Føroyar hevur tvey stig fleiri enn Ajax Keypmannahavn og hevur vunnið báðar innanhýsis dystirnar ímóti teimum, so er uppflytingin veruleiki.

### Menninir væl við

Eisini menninir vunnu sín dyst, sum eins og hjá kvinnunum var teirra næstsíðsti. Talan gjørdist um ein 27-19 sigur á HIK, eftir hálvleiksstøðuna 12-6.

Dysturin skuldi vinnast, soleiðis at føroysku harrarnir hava eitt so gott útgangsstøði sum gjørligt undan dystinum móti Team Nørrebro 5. apríl, sum verður eitt slag av finulu um at flyta upp í Seriu 1, sum er undir Keypmannahavnarseriuni.

Oman fyri Keypmannahavnarseriuna er CBB deildin, umframt 1., 2. og 3. deild, so Seria 1 svarar til 6. deild, og tað er her, at menninir hjá ÍF Føroyum ætla at spæla næsta ár.

# Heini Hanusarson vendir heimaftur

**Fremsti føroyski hondbóltsspælarin verður helst aftur at síggja í føroysku hondbóltskappingini komandi kappingarár**

HONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Fremsti føroyski hondbóltsspælarin, Heini Hanusarson, sum hevur gjørt vart við seg í bestu og næstbestu donsku hondbóltsdeildunum síðstu árini, fer at spæla helst í Atlantic Airways-deildini komandi kappingarár. Tað avdúkaði hann í tíðindasendingini hjá Rás2 seinnapartin í gjár.

Enn er óvist, hvat felag í Atlantic Airways-deildini, Heini Hanusarson fer at binda seg til, men eingin ivi man vera um, at hann fer at fáa fleiri tilboð.

– Eg komi fyrst og fremst heim at arbeiða sum politistur í summar, og allarhelst eisini at spæla hondbólt, men einki er enn avgjørt um, hvar eg møguliga fari at spæla, sigur Heini Hanusarson.

### Sær svart út

Hann var við sjey málum toppskjútti á liðnum hjá Ajax Keypmannahavn, sum í fyrradagin tapti týðandi dystin ímóti Nordsjælland Håndbold, nú sær av álvara svart út hjá liðnum í bestu donsku mansdeildini í hondbólti.

– Tað er altíð eitt plástur á sárið, tá tað gongur hampuligt persónliga, men tað nyttar lítið, tá vit tapa. Tú spælir á einum liði fyri at vinna, og tað eydnaðist so ikki, sigur Heini, sum tekur undir við venjara sínum, Christian Dalmose, at eitt undur skal henda, um Ajax nú skal yvirliva í bestu deildini:

– Nú sær svart út, tí kravið var, at vit í minsta lagi skuldu fáa trý stig, men nú eru bara tveir truplir dystir eftir, sigur hann.



*Heini Hanusarson kemur í summar heimaftur til Føroya at arbeiða sum politistur, so tá verða óivað eisini boð eftir honum sum hondbóltsspælara í Atlantic Airways-deildini*